Birgit Kleis, ríkisumboðsmaður:

# Føroyingar eru tilvitaðir um søguna

**Nýggi ríkisumboðsmaðurin í Føroyum er 45 ára gamla Birgit Kleis. Hon væntar, at Føroyar fáa økt sjálvstýri í nærmastu framtíð, uttan tó at siga nakað um, hvussu karmarnir vera. Hon hevur lagt til merkis, at føroyingar eru ógvuilga tilvitaðir um søgu, bakgrund og familju sína**

RÍKISUMBOÐSMAÐURIN
*Stefan í Skorini*

– Eg havi glett meg nógv at fara undir hetta nýggja starvið, og hetta er ein stór avbjóðing hjá mær, sigur nýggi ríkisumboðsmaðurin.

Fyri góðari viku síðani tók Birgit Kleis við starvinum sum ríkisumboðsmaður, ið er fremsti umboðsmaður hjá donsku stjórnini í Føroyum. Hon gleðir seg til hesa nýggju avbjóðingina, men enn hevur hon tó ikki sett seg inn í øll viðurskifti viðvíkjandi starvinum. Hesa fyrstu tíðina á borgini hevur hon roynt at føla seg fram á ymsum økjum í starvinum. Hon leggur afturat, at umleið helmingurin av starvsfólkunum eru tey somu, sum tá hon var her á fyrsta sinni.

Um føroyingar sigur nýggi ríkisumboðsmaðurin, at vit eru ógvuliga tilvitaðir um okkara søgu, bakgrund og eisini um familjuna. Hetta er ein styrki, men er tó ikki vanligt í Danmark. Hinvegin metir hon eisini, at tað er nógv, ið danir og føroyingar hava felags. Tað er tann norrøni felagsarvurin, sum bæði fólkini hava til felags.

Birgit hevur fyrr arbeitt á skrivstovuni hjá ríkisumboðnum sum fulltrúi. Tað var í tíðarskeiðnum frá 1986 til 1988. Hon kennir tí føroysk viðurskifti, og hon heldur, at tað var ein fyrimunur hjá henni í umsóknini til starvið, at hon hevði arbeitt hjá ríkisumboðsmanninum áður. Hon arbeiddi undir Bent Klinte, ið tá røkti hetta starvið.

– Síðan eg var í Føroyum í áttatiárunum havi eg altíð hugsað um at koma aftur hendavegin. Hetta var eitt starv, um eg kendi til, og tí var tað upplagt hjá mær at søkja, sigur Birgit Kleis, ið hevur ein trý ára sáttmála. Hon hevði tí ikki torført við at taka av tilboðnum um at gerast ríkisumboðsmaður. Hon veit ikki, um hon fer at halda á, eftir at hetta skeiðið er runnið, men tann avgerðin verður tikin seinni.

Hon er útbúgvin jurist á Københavns Universitet í 1985, tá hon fekk prógvið. Áðrenn hevði hon tikið matematiskt studentsprógv í danska høvuðsstaðnum, har hon eisini er uppvaksin.

Síðani arbeiddi hon eitt stutt skifti hjá umboðsmanninum í Fólkatinginum, áðrenn hon legði leiðina til Føroyar. Síðan 1988 hevur hon fyri tað mesta starvast í Løgmálaráðnum í Keypmannahavn. Nú er hon so ríkisumboðsmaður, sum almenna heitið er.



*Nýggi ríkisumboðsmaðurin møtti manninum í Mikladali, og tey hava bæði verið aftur og ferðast har saman*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Mest sjálvstýri

Birgit Kleis væntar, at yvirtøkur og mál viðvíkjandi sjálvstýri fara at upptaka nógv av hennara arbeiðstíð komandi mánaðirnar.

Slík mál hava verið ovast á dagsskránni síðan henda samgongan tók við, og uppgávan hjá Birgit er at samskifta við donsku stjórnina um slík viðurskifti. Hon skal tí altíð fylgja við, hvat hendir á tí hermótinum.

– Mín høvuðsuppgáva er at flyta áskoðanir og upplýsingar millum tey bæði londini, og eg skal vera við til at fáa góð úrslit í samráðingum millum partarnar, sigur Birgit Kleis. Hon dylur tó ikki fyri, at hon er í starvi hjá donsku stjórnini, og tí fer hon altíð at vera á tí síðuni í samráðingum.

Hon sigur tó, at hon hevur eitt serligt samband við Føroyar og føroyingar. Hon er ikki í somu støðu sum politikarar og embætisfólk. Hon vónar ikki, at hon verður noydd at velja tann eina partin framum hin í samráðingum millum Føroyar og Danmark.

– Eg vænti, at Føroyar fara at fáa økt sjálvstýri á ein ella annan hátt, áðrenn ov long tíð er liðin, sigur Birgit. Hvussu skjótt og hvussu karmarnir fara at vera, vil hon tó ikki spáa um.

## Fyrimunur at vera kvinna

Fráfarni ríkisumboðsmaðurin Vibeke Larsen segði í samrøðu í sjónvarpinum, at tað hevði verið ein fyrimunur hjá henni at vera kvinna í hesum høga og týdnignarmikla starvinum.

Hesum hugusnarhátti kann Birgit Kleis taka undir við uttan tó at hava sitið í hesum starvinum serliga leingi.

Onkur hevur ført fram, at embæði hjá ríkisumboðsmanninum ikki hevur nakran týdning, men bara er kransakøkufigururin hjá dønum í Føroyum.

Hesum er Birgit Kleis ikki samd í. Hon heldur, at hetta starvið hevur stóran týdning í samskiftinum millum føroyingar og danir.

– Eg haldi, at eg kann geva eitt týdningarmikið íkast við upplýsingum báðar vegir, og tí haldi eg ikki, at eg bara eri ein kransakøkufigurur, sigur Birgit Kleis.

## Møtti manninum í Mikladali

Tað var meðan Birgit starvaðist í Føroyum, at hon møtti manninum, sum hon er gift við í dag. Hon greiðir frá, at tey høvdu felags kenningar, og soleiðis komu tey at kennast.

Tað var tó á einum túri í Mikladali, at tey bæði komu at kennast væl. Hetta var ein útferð, sum starvsfólkið á ríkisumboðnum gjørdu. Birgit sigur, at tey bæði síðani hava verið aftur í Mikladali og ferðast.

Maðurin hevur arbeitt sum tíðindamaður í Danmark seinastu nógvu árini, og tey bæði eiga tvey børn. Drongurin Thomas, sum er sjey ára gamal, er farin í fyrsta flokk í Kommunuskúlanum í Havn. Tey eiga eisini eina dóttur, ið eitur Maria og er trý ára gomul.

– Eg eri ógvuliga fegin um, at eg fekk hetta starvið. Tó vóni eg ikki, at hetta hevur broytt meg sum persón, sigur Birgit Kleis.



*Birgit Kleis heldur, at føroyingar eru ógvuliga tilvitaðir um søgu og bakgrund sína. Hinvegin líkjast føroyingar og danir eisini á nógvum økjum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# ítróttur

Nr. 218 • leygardagur • 10. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF-H71 33-30 (15-12):

## VÍF hevði munin

**Vestmenningar fingu harða mótstøðu frá H71, men teir kláraðu at halda seg frammanfyri meginpartin av tíðini og vunnu við trimum málum**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Vestmenningar høvdu ongan lættan dyst ímóti H71, men hoyvíkingur kláraðu ikki til fulnar at steðga VÍF, og teir taptu tí triðja dystin á rað.

Munurin millum liðini var ikki stórur, men tað vóru vestmenningar, sum høvdu munin meginpartin av tíðini.

Í fyrra hálvleiki skiftust liðini eitt sindur um at vera frammanfyri, men tá VÍF fór fram um miðskeiðis í hálvleikinum, fekk H71 ongantíð vertirnar aftur. H71 hekk tó í allatíðina, og tá fyrri hálvi tímin var av, var VÍF frammanfyri við trimum málum.

H71 hevði tá brent trý av sínum brotskøstum, og tað er dýrt, tá talan er um so tættan dyst.

### Málríkt

Í seinna hálvleiki drógu hoyvíkingur inn á VÍF, og teir kláraðu at javna eftir fáar minuttir. Hesa løtuna tóktist VÍF-liðið sárbart, og tað var næstan sum um teir roknaðu við einum løttum seinna hálvleiki.

Men kvøkkurin setti ferð á VÍF aftur, og teir togaðu seg fram um aftur. Miðskeiðis í seinna hálvleiki økti heimaliðið leiðsluna upp í fimm mál, og tað var lítil ivi um, at VÍF fór at vinna.

H71 skoraði nógv mál seinasta partin av dystinum, men tað gjørdi VÍF eisini, og tí endaði málríki dysturin við, at VÍF vann 33-30.

### H71 uppsteðgað

Sigurin hevði við sær, at VÍF tók seg fram um Neistan, men vestmenningar hava spælt ein dyst meira enn havnaliðið. Um vikuskiftið skal Neistin royna at fáa VÍF aftur.

H71 byrjaði árið við trimum sigrum á rað, men síðani hava teir tapt tríggjar á rað, og liðið er í løtuni ikki nóg støðugt til at fylgja við VÍF og Neistanum, men talan er framvegis um grundspæl, og støðan kann broytast komandi vikurnar.

**Dysturin í tølum:**
VÍF-H71 33-30 (15-12)
**Málskjúttar:**
**VÍF:** Johnny Joensen 10, Sámal Joensen 7 (2), Ingi Olsen 6 (1), Harald Bjørgvin 5, Daniel Rapa 2, Petur F. Joensen 2, Rógvi Nielsen 1
**H71:** Bjarni Wardum 8 (2), Finnur Hansson 7 (1), Halgir Dahl Olsen 6, Anfinn Debes 3, Peter Rouch 2, Hallur Danielsen 1, Peter Rosbach 1, Janus Joensen 1, Johnny Durhuus 1
**Brotskøst:** VÍF 3, H71 7
**Útvísingar:** VÍF 2, H71 4
**Dómarar úr Tjaldri:** Kári Hansen og Trygvi Mortensen.



*VÍF hevði í løtum trupulleikar at basa hoyvíkingum, men tá dysturin var av, vóru føroyameistararnir frammanfyri við trimum málum*

## Neistin skal royna seg í Vági

**Kvinnuliðið hjá Neistanum skal sunnudagin vísa, um liðið kann verða við í toppstríðnum. VB skal royna at reisa seg eftir lemjandi tapið seinasta vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Neistin hevur gott kvinnulið í ár, men higartil hevur liðið tapt fyri VÍF og Stjørnuni, sum eru fremstu liðini í deildini.

Sunnudagin sleppur Neistin at royna seg ímóti einum av liðnum, sum rokna verður við kemur at blanda seg upp í oddastríðið.

Hetta verður dystur millum tveir av avbjóðaranum hjá VÍF, og Neistin skal nú vísa, um liðið kann verða við í toppstríðnum, ella um liðið má noyðast við eina støðu aftanfyri VÍF, Stjørnuna og VB.



*VB fær sunnudagin møguleikan at reisa seg, tá Neistin vitjar í høllini í Vági*

### Skulu reisa seg

Eitt skert VB-lið var fyri stórtapi í Klaksvík farna vikuskiftið, so hetta vikuskiftið ræður um hjá vágbingum at reisa seg aftur.

Tað skal liðið gera á heimavølli, og tað er ein sannroynd, at fá lið fáa nakað við sær norðuraftur, tá tey hava verið í Vági og spælt.

Dysturin millum VB og Neistan verður sunnudagin kl. 13.45.

### StÍF stóra mótstøðu

StÍF vann seinasta vikuskiftið fyrsta dystin á árinum, tá uppflytararnir vitjaðu í høvuðsstaðnum. Kyndlaliðið er komið illa frá byrjan, og StÍF kláraði at koppa teimum.

Hesaferð kunnu strandingar rokna við harðari mótstøðu, tí Stjørnan kemur á vitjan. Stjørnan vann sannførandi á VB seinasta vikuskiftið, og tær elta VÍF í oddinum.

Breiddin á Stjørnuliðnum er stór. Nógvir spælarar taka ábyrgd, og stórskjúttin Simona Dzuigyte hevur ongantíð gjørt færri enn 10 mál í dysti higartil í ár.

Dysturin millum StÍF og Stjørnuna verður á Skála sunnudagin kl. 14.30.